# Høgni heldur óvanliga høgt atkvøðutal



*Høgni Hoydal var aftur toppskorari í Suðurstreymi*



*Katrin Dahl Jakobsen fall – og harvið er drúgva kvinnuliga umboðanin hjá Javnaðarflokkinum í Suðurstreymoy burtur*

**Tíggjunda ferðin, at Óli Breckmann varð valdur, var fyrsta ferðin, at hann ikki var valdømisvaldur**

SUÐURSTREYMOY
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Valkvøldið vórðu viðmerkingar gjørdar til atkvøðutølini í einstøku valdømunum. Viðmerkingarnar til tølini í Suðurstreymoy vóru fáar og smáar. Hetta komst fyrst og fremst av, at tá ið tølini fyri Havnina vóru klár, varð landsúrslitið greitt, og harvið bar til at fara til formansumfarið. Tí verður gjørt eitt lítið sindur burturúr fólkaríkasta valdøminum her, nú eina viku eftir valið.

Fullveldisrákið kendist fyrst og fremst í høvuðsstaðnum. Soleiðis hevur ofta verið tikið til. Sipað hevur verið til tann veruleikan, at Tjóðveldisflokkurin á valinum í 1998 vann tríggjar valdømisvaldar tingmenn í Suðurstreymi. Frammanundan hevði flokkurin bert havt ein tingmann í fólkaríkasta valdøminum. Í 2002 megnaði Tjóðveldisflokkurin at endurvinna tríggjar í hesum valdøminum. Hesa ferð varð roknað við, at flokkurin mundi fara at missa ein valdømisvaldan tingmann, men tað gjørdi hann ikki.

Fyrst og fremst orsaka av óvanliga høga persónliga atkvøðutalinum hjá Høgna Hoydal endurvann Tjóðveldisflokkurin tríggjar valdømisvaldar. Hesa ferð atkvøddu 1421 fyri Høgna persónliga. Við 1521 atkvøðum setti hann met í 1998. Í 2002 fekk hann 1351 atkvøður, og hesa ferð lyfti hann seg upp á 1421. Burtursæð frá Høgna í 1998 og Lisbeth L. Petersen í 2002 (1394 atkvøður) er hetta hægsta persónliga atkvøðutalið nakrantíð. Atli Dam fekk 1356 atkvøður í 1990. Hægsta talið hjá Jógvani Sundstein var 1001 (í 1988), og hægsta talið hjá Paula Ellefsen var 1037 (í 1988).

Annita á Fríðriksmørk fekk hesa ferð 527 atkvøður. Í 2002 fekk hon 405 atkvøður. Valið hesa ferð staðfesti hennara støðu sum nummar tvey í Suðurstreymi. Verri gekk tað hjá Kristinu Háfoss. Í 2002 varð hon triðji tjóðveldistingmaðurin við 364 persónligum atkvøðum. Hesa ferð fór talið niður á 160. Finnur Helmsdal fekk í 2002 203 atkvøður. Tað var tvær færri enn Jógvan Arge, sum kom í tingið, tá ið Høgni Hoydal gjørdist landsstýrismaður. Hesa ferð fekk Finnur nakrar atvøður færri, enn hann gjørdi fyri tveimum árum síðani, men hann kom í tingið við 197 atkvøðum. Við sama atkvøðutalinum komu Jógvan Arge og Rói Egholm ikki í tingið.

Síðsta ferðin, at tað frammanundan var lutakast um valdømisvaldan tingsess í Suðurstreymi, var í 1978. Tá fingu Eilif Samuelsen og Dánjal Larsen, sum báðir vóru á sambandslistanum, 105 persónligar atkvøður. Annar teirra skuldi í sessin aftaná Paula Ellefsen, og Eilif vann lutakastið.

## Óli eykavaldur

Óli Breckmann er tann í nýggja tinginum, sum hevur drúgvastu parlamentarisku royndirnar. Hann hevur sitið í tinginum út í eitt síðani í november 1974. Fyri einari viku síðani var hann fyri tíggjundu ferð valdur í løgtingið. Tá ið hann varð valdur fyrstu ferð, fekk Fólkaflokkurin bara ein valdømisvaldan í Suðurstreymi. Óli Breckmann vann sessin frá Knúti Wang, sum hevði verið valdømisvaldur síðani í 1958. Knút kom ikki inn, tí Eliesar Arge varð eykavaldur.

Síðani í 1974 hevur Fólkaflokkurin átt í hvussu so er tveir valdømisvaldar hvørja ferð, og Óli Breckmann hevur hvørja ferð verið valdømisvaldur. Fólkaflokkurin hevði hesa ferð eitt gott val. Undantakið var í Suðurstreymi, har teir duttu niður á ein valdømisvaldan. Tað var Bjarni Djurholm, sum fekk 595 persónligar atkvøður. Óli Breckmann fekk 450 persónligar atkvøður. Á valinum í 2002 fekk Bjarni 393 atkvøður, og Óli fekk 511.

Hóast Poul Michelsen ikki kom í tingið hesa ferð, so fekk hann fleiri persónligar atkvøður, enn hann fekk í 2002. Ta ferðina fekk hann 293, og hesa ferð fekk hann 335. Um Bjarni Djurholm verður landsstýrismaður, so fara hesar atkvøðurnar at bera Poul í tingið.

## Eingin kvinna

Nógvu tey seinastu árini hevur Javnaðarflokkurin í Suðurstreymi havt kvinnuliga umboðan í tinginum. Tað hevur hann ikki longur. Kristian Magnussen og John Johannesen vórðu valdir við ávikavíst 412 og 380 persónligum atkvøðum. Á næstu plássunum eru tvær kvinnur – Helena Dam á Neystabø við 342 og Katrin Dahl Jakobsen við 308 atkvøðum.

Fyrsta kvinnan, sum umboðaði Javnaðarflokkin í Suðurstreymi í tinginum, var Jona Henriksen. Hon kom í tingið fyri Jákup Lindenskov í 1975, og hon varð vald á ting í 1978. Í 1980 og 1984 varð eingin kvinnulig umboðan fyri Javnaðarflokkin í Suðurstreymi. Frá 1988 og til 1998 var Marita Petersen, sáli, vald í størsta valdøminum, og síðani tá hevur Katrin Dahl Jakobsen verið vald tvær ferðir. Í 2002 var hon fyrst vald á javnaðarlistanum við 459 persónligum atkvøðum, meðan Kristian Magnussen, sum varð eykavaldur, fekk 328 persónligar atkvøður.

## Kaj Leo staðfesti sína støðu

Á sambandslistanum var talan um rættuligt skrædl hjá Lisbeth L. Petersen, sum fór frá 1394 atkvøðum í 2002 og til 648 atkvøður hesa ferð. Kaj Leo Johannesen meiri enn tvífaldaði sítt atkvøðutal. Hann fekk 263 atkvøður í 2002. Tær vóru nóg mikið til eykavaldan sess. Hesa ferð fekk hann 551 atkvøður og syfti væl og virðiliga Heðini Mortensen, sum fekk 397 atkvøður. Í 2002, tá ið hann rakk næsta valdømisvalda sessinum hjá Sambandsflokkinum í Suðurstreymi, atkvøddu 410 fyri Heðini Mortensen.

Sambandsvalið boðar frá, at Kaj Leo Johannesen tykist standa stinnastur í høvuðsstaðnum. Spurningurin er so, hvør fer at bjóða av um næsta sessin, tá ið Lisbeth L. Petersen hevur tikið seg aftur.

Jenis av Rana er so tryggur í tinginum, sum tað ber til at vera, tá ið talan er um eykavaldan sess. Á sjálvstýrislistanum fekk Sámal Petur í Grund ikki undirtøku, sum bendir á, at hann er á veg aftur í tingið. Malan Johansen fekk eitt rimmar val. Sjálvstýrisflokkurin restaði eina atkvøðu í at skula í lutakast við Eysturoyar valdømi um einsamalla eykavalda sessin. Møguleiki eigur at vera fyri sjálvstýrisumboði í Suðurstreymi, og valið hesa ferð bendi á, at Malan Johansen kann fara at gerast tingmaður, tá ið val verður næstu ferð. Nær tað verður, er ein heilt annar spurningur.

Tað er merkisvert, hvussu hugaðir veljararnir í høvuðsstaðnum eru í at velja. Hesaferð var valluttøkan 91,3% í Havnini, tað er met, og tað skal leitast leingi eftir høvuðsstaði, har valluttøkan er so stór, sum hon er í høvuðsstaðnum.



Lærumeistarin Cathrina Sadolin:

# Tað býr ein sangari í okkum øllum



*Víðagitni sanglærarin, Cahtrina Sadolin, heldur at tað býr ein sangari í øllum menniskjum, men kortini er hon bilsin av øllum gávuríku sangarunum i Føroyum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Víðagitni sanglærarin úr Danmark gav frálæru til sanghugaðar føroyingar í vikuskiftinum. Hugskotið við skeiðnum var, at tann einstaki lærur røddina at kenna og gerst betri sangari**

SANGSKEIÐ
*Steintór Rasmussen*

Tað var ein góð blanding av leikum og lærdum í Norðurlandahúsinum. 15 sangarar høvdu meldað luttøku í meistarabólkinum, men harumframt vóru fleiri áskoðarar sum fingu ráð og vegleiðing frá Cahtrinu Sadolin, sum vitjaði Føroyar á fyrsta sinni.

Cathrina verður roknað millum tey fremstu í heiminum, tá tað snýr seg um vitan og frálæru innan sang. Sjálv hevur hon útfrá egnum royndum og teorium skrivað bókini Komplet Sang Teknik, sum av mongum verður mett sum bíblian hjá øllum sangarum. Eisini hjá Cathrina Sadolin er boðskapurin sera einfaldur.

– Øll kunnu syngja. Tað er bert ein spurningurin um at brúka røddina og kroppin á rætta hátt, sigur Cathrina og ger samstundis vart við, at tað er umráðandi at sangarin lurtar eftir sær sjálvum, venur og arbeiðir við røddini. Tað eru fleiri mátar at gerast góður sangari, men tað sum hevur størsta týdning, er at ein nýtur tey amboðini, sum gagna einum sjálvum best.

## Nógv at taka av

Hóast Catrhina heldur at tað býr ein sangari í øllum menniskjum, so er hon kortini bilsin av hvussu nógvir gávuríkir sangarar eru í Føroyum.

– Eg haldi at tað hevur verið serstakliga stuttligt og spennandi at hildið skeið her. Fólk eru sera opin og móttakilig. Tey, sum hava luttikið, hava torað væl at viðurkent og víst á sínar egnum veikleikar. Og tað er sær sjálvum ein styrki. Harafturat havi eg hoyrt nógvar frálíkar røddir og tað er altíð hugaligt.

Cathrina Sadolin hevur sjálv drúgvar royndir bæði sum sangari, og hon arbeiðir nú sum granskari innan raddarslit. Eisini ferðast hon víða og heldur fyrilestrar um sang og teknik. Hennara vitan og innlit innan sang hevur gjørt Cathrinu til eitt høgt virt navn um allan heimin.

Sosialurin var á skeiðnum, og í blaðnum leygardagin, hava vit eina samrøðu við Cathinu Sadolin. Prátað varð eisini við fólk, sum sungu og lýddu á.

HALDIÐ SOSIALIN

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn:
Bústaður:
Postnr.:
Bygd/býur:
Telefon nr.:
Undirskrift:

Ókeypis
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

64

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

400,- um ársfjórðingin
- sparið 380,- í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO